# Claus brast saman við Bowyer

Blackpool vann leygardagin dyst í næstbestu ensku fótbóltsdeildini. Blackpool spældi á heimavølli ímóti Birmingham og vann 2-0. Bæði málini hjá Blackpool vórðu skotin í fyrra hálvleiki. Fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen spældi við í dystinum, men eitt korter fyri leiklok fekk hann reyða kortið. Útvísingin kom eftir ein samanbrest við Lee Bowyer, har Claus hevndi seg.



# Buffon til sølu

Gianluigi Buffon telist millum bestu málmenn í heiminum, og hann er til sølu, um boðið er nóg stórt. Tað sigur í øllum førum Buffon sjálvur. - Eg eri ein fótbóltsspælari, og eg veit, at fótbóltsfeløg eru forrætningar, so um eitt felag bjóðaði eina stóra upphædd fyri meg, so hevði eg verði seldur, sigur Buffon við italskar miðlar.

## Danmark trumfaði á Balkan

**Makedonia vísti seg ikki at hava neyðugu vápnini at gera av við Kasper Hvidt og hugflogsríka danska hondbóltslandsliðið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*Jakup@sosialurin.fo*

Danska landsliðið í hondbólti hevur undan síðsta dystinum í millumumfarinum framvegis heilt góðan møguleika at spæla seg í hálvfinaluna.

Í gjárkvøldið vann Danmark 32-24 stórsigur ímóti Makedonia, sum ikki í nóg stóran mun megnaði at bróta ígjøgnum donsku verjuna, og hevði meiri enn torført við at fáa bóltin inn um Kasper Hvidt, sum var heilt framúr í danska málinum.

Leygarkvøldið vóru danir í 1. hálvleiki heilt við síðuna av sær sjálvum. Men hesa ferð løgdu teir fyri sum eitt ódnarveður. Álopsspælið var frágera gott, og Danmark var á odda allan 1. hálvleik, men eftir fyrra umfarið var leiðslan bara 13-12.

Fyrstu løtuna í 2. hálvleiki spruttaði Makedonia, og eina ferð var liðið av Balkan – til stóra fragd fyri nógvu áskoðararnar – á odda.

Danir vístu seg tó at hava størri breidd og tyngd, og sum 2. hálvleikur leið, hvarv spenningurin sum døggin fyri Balkan sólini.

# Noreg hevur reist seg úr øskuni



*Norsku hondbóltsharrarnir hava enn vónina um eitt pláss í hálvfinaluni í HM-kappingini í hondbólti*
*Mynd: Polfoto*

**Við tveimum sigrum í millumumfarinum, hava norðmenn enn møguleika at røkka hálvfinaluni**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Leygardagin vunnu norðmenn 29-27 á Makedonia í HM-millumbólki 2. Og ígjár vann Noreg ein dramatiskan dyst ímóti Týsklandi við úrslitinum 25-24. Håvard Tvedten og Kristian Kjelling skutu 7 mál í part, og vóru teir saman við málverjanum, Steinar Ege høvuðsmennirnir aftanfyri norska sigurin. Týski stórspælarin, Christian Schöne fór út skaddur á børu, og er tað eitt stórt minus í bókini hjá Týsklandi.

### Ein óður venjari

Týski venjarin, Heiner Brand var dansandi óður inn á dómarnar. Tá 11 sekund vóru eftir, og týskarnir høvdu ein møguleika at javna til 25-25, bríkslaðu dómarnir tvær ferðir, tí týskarnir ikki stóðu á røttum staði, tá teir fóru í álop. Hetta gav norðmonnum ein greiðan fyrimun meinti Heiner Brand, sum fór nevandi inn á vøllin, men tíbetur fór týski venjarin ikki longur, enn til ímyndirnar. Heiner Brand ákærdi eisini norska spælaran, Frank Løke at verða ósportsligan, og at gera sítt til at fáa týskar spælarar útvístar í 2 minuttir.

### Norðurlendskar vónir

Báðir sigrarnir hava tendrað ljósið fyri Noreg aftur, sum tyktist slókt, aftaná tapini ímóti Danmark og Serbia. Danmark hevur 6 stig, Týskland 5 stig, Pólland 4 stig, og Noreg hevur 4 stig. Vinnur Noreg á Póllandi týsdagin, og fær Danmark stig ímóti Týsklandi, so skulu bæði Danmark og Noreg spæla hálvfinalu friggjadagin. Tað hevði verið vorðið sum! Mótstøðuliðini í hálvfinaluni verða øgilig. Frakland og Kroatia hava bæði 8 stig í hinum HM-millumbólkinum, og tey eru ein klassa omanfyri hini liðini í bólkinum.

**HM-støðurnar**

**Bólkur 1**

| | | d | v | j | t | mál | +/- |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Frakland | 4 | 4 | 0 | 0 | 120-90 | 30 |
| 2 | Kroatia | 4 | 4 | 0 | 0 | 115-98 | 17 |
| 3 | Ungarn | 4 | 1 | 1 | 2 | 99-108 | -9 |
| 4 | Slovakia | 4 | 1 | 1 | 2 | 97-110 | -13 |
| 5 | Svøríki | 4 | 1 | 0 | 3 | 108-114 | -6 |
| 6 | Suðurkorea | 4 | 0 | 0 | 4 | 92-111 | -19 |

**Bólkur 2**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Danmark | 4 | 3 | 0 | 1 | 129-120 | 9 |
| 2 | Týskland | 4 | 2 | 1 | 1 | 122-106 | 16 |
| 3 | Pólland | 4 | 2 | 0 | 2 | 119-111 | 8 |
| 4 | Noreg | 4 | 2 | 0 | 2 | 108-110 | -2 |
| 5 | Serbia | 4 | 1 | 1 | 2 | 121-133 | -12 |
| 6 | Makedonia | 4 | 1 | 0 | 3 | 104-123 | -19 |


